# til stuðlar

Júst tað, at flyta seg frá at vera ein byrða til ein stuðul er ein kollveltandi broyting. Heilbrigdið sigur eisini í slagorðið sínum, at teir eru brúgvin til lívið.

– Vit byggja brýr millum avnoktan og veruleika. Tað er við at viðganga veikleikar, at vit gerast sterk, heldur Ingi Mohr fyri.



*Stovnararnir av Heilbrigdinum, frá vinstru Ingi Mohr, Nanna Skála og Jákup Lindenskov*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Ingi Mohr, Vígdis Finnbogadóttir og Nanna Skála í Heilbrigdinum á Velbastað, tá táverandi íslendski forsetin vitjaði í Føroyum*



*Núverandi nevndin frá vinstru: Eyðun Joensen, Per Persson, Rasmus Petursson, Sólrun Olsen, Jákup Lindenskov og leiðarin á stovninum Ingi Mohr*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Andaliga lívið týdningarmikið



*Ein persónlig heilsan til Inga Mohr frá góða vinmanninum Father Martin, ein katólskur prestur í USA. Á myndini sæst Father Martin saman Jóhannes Páll páva II*

**– Vit byggja ikki á eitt kristið grundarlag, men vit praktisera tað út frá sjey av tólv sporum, sum umrøða andaligheit í viðgerðini, sigur Ingi Mohr, ið eisini veit at siga, at Heilbrigdið hevur betur úrslit enn fleiri onnur lond**

HEILBRIGDIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Heilbrigdið brúkar Minnesota-fyrimyndina í sínum virksemi. Hetta er ein 12 spora viðgerð, og hevur hon víst seg at vera viðgerðin, ið gevur best úrslit.

Sum heitið á viðgerðini bendir á, so hevur hon sín uppruna í Minnesota, USA. Hagani kom hon til Íslands, og úr Íslandi kom so hesin viðgerðarhættur til Føroya.

– Føroyar tóku sum eitt tað fyrsta landið í Evropa Minnesota-fyrimyndina til sín, so har vóru vit fyri einaferð skyld ímillum tey fremstu, sigur Ingi Mohr og smílist.

– Í hesum 12 spora viðgerðarháttinum, verður andaligheit umrøtt í sjey av sporunum. Tí er tað ikki av tilvild, at fólk eftir viðgerðina á Heilbrigdinum, hava fingið eitt størri andaligari lív, tá tey koma aftur í gerandisdagin.

– Vit byggja ikki á eitt kristið grundarlag, men vit praktisera tað út frá teimum sjey sporunum, sum umrøða andaligheit.

Ingi Mohr vísir á, at alkoholisma er ein andalig sjúka, har sjúklingurin leitar eftir eini heildarmynd av sær sjálvum.

– Tí er andalig føði ein fortreyt, eins væl og matur, sigur Ingi Mohr. Hann vísir á, at teir ikki taka dagar ímillum hvørt fólk eru baptistar, evangelistar, kirkjufólk ella okkurt heilt annað.

– Tað týdningarmiklasta er, at fólk fáa sær eitt andaligt lív aftaná. Vit plaga at siga, at eftir viðgerðina skulu fólk hava tveir stavar at stiga seg til. Tann eini er andaligi stavurin, og hin er AA stavurin, altso at luttaka á AA fundum okkara, sigur Ingi Mohr.

Onkur hevur kanska hug at seta spurnartekin við, um tað er neyðugt, at andaligheit spælir ein so stóran leiklut í viðgerðini. Ingi Mohr ivast ikki.

– Í Føroyum er tað løttari at góðtaka, at andaligi parturin fyllir so nógv í viðgerðini, enn tað er aðrastaðni. Tí hevur tað ikki verið nakar trupulleiki, og tað er eisini ein sannroynd, at vit her í Føroyum kunnu vísa á betri úrslit enn onnur lond, sigur Ingi Mohr.




*Ingi Mohr í New York hjá General Service Office, sum er stóra samskipanarorganið hjá AA-rum*